

# Merkið í húnar hátt á Exxon høvuðsborgini í London

Jan Müller

22.12.2013 - 22:43

Oljan.fo

Eitt av feløgunum, sum fer at bora á føroyska landgrunninum komadi ár, er heimsins størsta oljufelag, ExxonMobil. Hóast felagið enn ikki er vorðið fyristøðufelag í Føroyum, so kann kortini sigast, at oljufelagið hevur tikið Føroyar til sín, nú tað hoyrir til nýggjastu kjarnuøkini hjá felagnum.

Og hesin veruleiki sæst aftur á tí risastóru høvuðsborgini hjá felagnum í Bretlandi. Har verður tað nógva av virkseminum hjá felagnum uttan fyri USA umsitið, og harímillum føroyska oljuleitingin. Og tað sæst eisini aftur í tí sjáldsama bygninginum í Leatherhead uttan fyri London, har føroyska Merkið er vundið í húnar hátt millum fløgg úr umleið 35 øðrum londum kring heim.

Síðani FOÍB, Føroya Oljuídnaðarbólkur, sum umboðar tey seks oljufeløgini, ið eru virkin í Føroyum, varð broytt og ment av nýggjum í 2011, hevur stjórin sum part av síni uppgávu vitjað útlendsku oljulimafeløgini úti í heimi umframt at vitja systurfeløg og oljumyndugleikar.

So var eisini í novmber, tá FOÍB vitjaði tvey av limafeløgunum, ExxonMobil og OMV í London. Eisini gekk leiðin inn á gólvið hjá systurfelagnum Oil & Gas UK og somuleiðis hjá bretska svarinum til Jarðfeingi, DECC.Føroyski oljuportalurin, sum er partur av arbeiðsøkinum hjá FOÍB, fylgdi eisini føroyska oljumálaráðharranum, Johan Dahl, tá hann vitjaði London í eitt nú oljuørindum.

At hava eitt so stórt og fíggjarliga og tøkniliga sterkt oljufelag sum ExxonMobil við í føroysku oljuleitingini kann bara vera ein styrki. Sum skilst letur felagið tað vera upp til fyristøðufelagið, sum er Statoil, at úttala seg um komandi virksemið. Men tú fær varhugan av, at felagið tekur uppgávuna í Føroyum í stórum álvara og vil gera heimaarbeiðið til fulnar – væl og virðiliga. Tað er ikki ein spurningur um at skunda sær, men at brúka ta tíð, sum er neyðug fyri at koma á mál.

Tá felagið hevur bundið seg til at vera partur av leitingini í einum landi, so verður hetta eisini gjørt á tann mest professionella hátt. Leiting er nakað, sum tekur tíð, og tí sær felagið onga orsøk til at skunda nakað ígjøgnum. Alt arbeiðið skal gerast trygt og væl, um so tað ber við sær, at hetta tekur tíð.

Verður olja funnin, so verða øll neyðug fyrilit tikin til eina komandi gongd. Ein kann væl siga, at hugburðurin hjá hesum risastóra amerikanska oljufelagnum er at arbeiða uppá langt sikt. At sannað verður, at tann neyðuga tíðin skal brúkast, tá tú er í einum jomfrúuligum og lutvíst ókendum øki,

ExxonMobil er heimsins størsta fyritøka við 82.000 starvsfólkum í 200 londum og økjum kring heimin. Á høvuðsstøðini í Leatherhead arbeiða meira enn 1000 fólk.

Myndir

Høvuðsborgin hjá ExxonMobil í Leatherhead uttan fyri London, har føroyska Merkið sæst millum mong onnur.

Innes Fergusson er leitistjóri fyri Føroyaøkið. Her saman við einum av kvinnuligu jarðfrøðingunum, sum eisini arbeiðir við Føroyaøkinum, umframt Jan Müller, stjóra í FOIB

   